Kunngerðablaðið A
2011 Hefti 9
ISSN 0907-905X

Nr. 23

29. mars 2011

**Kunngerð um broyting í kunngerð um Føroyska Altjóða Skipaskrá**

§ 1

Í kunngerð nr. 83 frá 19. mai 1992 um Føroyska Altjóða Skipaskrá, sum seinast broytt við kunngerð nr. 70 frá 8. juni 2010, verður § 5 orðað soleiðis:

„**§ 5.** Tá eitt skip verður skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, skal eigarin skrivliga til Skipaskrásetingina tilmelda ein umboðsmann, sum eigarans vegna kann taka sær av teimum skyldum, sum eru lagdar á eigaran sambært løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá og tryggja, at reglurnar í hesi kunngerð verða hildnar. Umboðsmaðurin skal vera búsitandi í Føroyum.

*Stk. 2.* Undantak kann gerast frá kravinum í stk. 1, um eigarin av skipinum er búsitandi í Føroyum. Tað sama er galdandi, um stjóri ella nevndarlimur í felagnum, sum eigur skipið, er búsitandi í Føroyum og viðkomandi sambært viðtøkum felagsins, kann tekna felagið og hevur ábyrgdina av teimum skyldum, sum eru hjá reiðarínum sambært løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá.“

§ 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 29. mars 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705